

# Atlantic Petroleum tilnevnt norskan oljuprís

Jan Müller

04.02.2014 - 21:55

Oljan.fo

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er vorðið tilnevnt til norska oljuprísin "Gullkronen 2014" sum "Newcomer of the Year" á norska landgrunninum. Tvs. sum tað besta nýggja oljufelagið á norska landgrunninum í fjør. Gullkronen verður latin feløgum, fólkum og bólkum, sum hava víst seg at standa fyri sera góðum úrslitum á landgrunninum undanfarna ár. Hetta er aðru ferð, at felagið er skotið upp til prísin.

Ben Arabo, stjóri sigur, at tey eru sera fegin um aftur at vera skotin upp til at vinna henda prísin. Felagið legði til brots á norska landgrunninum við at keypa eitt verandi oljufelag og hevur víst stóran áhuga fyri framtíðar møguleikum á langrunninum. Í fjør kom felagið á virðisbrævamarknaðin í Oslo og fekk tillutað tvey leitiloyvi á landgrunninum til at bora í 2014. Jonny Hesthammer, stjóri fyri norska dótturfelagið er eisini sera væl nøgdur til útnevningina, nú felagið hevur økt talið á loyvum úr 2 til 6. Og haraftrat koma 2 loyvi aftrat í 2014, um stjórnin gevur grønt ljós